**Fíggjarmálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 04.09.2023 |
| Mál nr.: | 23/16224 |
| Málsviðgjørt: | JEK |
| Ummælistíð: | Skrivið frá 04.09 til 23.09.2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum**
(Framskundað stigvíst virðisgjald fyri dýrar ravmagns- og vetnisbilar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 6 frá 27. februar 2023, verður gjørd henda broyting:

§ 3, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Persónarbilar, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum verða skrásettir í:
1) 2024 skulu rinda 0% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum omanfyri kr. 200.000,
2) 2025 skulu rinda 7,5% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000, 11,25% í virðisgjaldi av virðinum millum kr. 100.000 og kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av virðinum omanfyri kr. 200.000,
3) 2026 skulu rinda 15% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000, 22,5% í virðisgjaldi av virðinum millum kr. 100.000 og kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av virðinum omanfyri kr. 200.000,
4) 2027 skulu rinda 22,5% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000, 33,75% í virðisgjaldi av virðinum millum kr. 100.000 og kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av virðinum omanfyri kr. 200.000, og
5) 2028 og fylgjandi ár 30% av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000 og 45% í virðisgjald av virðinum kr. 100.000 ella hægri.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Við uppskotinum verður avgjaldsfrítøkan fyri sonevndar luksusbilar broytt. Broytingin ber í, at ravmagns- og vetnisbilar frá 1. januar 2024 at rokna koma at rinda eitt virðisgjald av tí partinum av cif-virðinum, sum fer upp um kr. 200.000.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi lóggávu eru persónbilar, sum nýta ravmagn ella vetni til framdrift, avgjaldsfríir til og við 31. desember 2024. Frá 1. januar 2025 skulu hesi akfør rinda eitt stigvíst hækkandi avgjald, sum í 2028 og fylgjandi ár er 30% av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 100.000 og 45% av avgjaldsskylduga virðinum omanfyri kr. 100.000.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at leggja avgjald á dýrar persónbilar, sum nýta ravmagn ella vetni til framdrift skjótari, enn galdandi lóggáva ásetir.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið broytir verandi áseting um avgjaldsfrítøku fyri persónbilar, sum nýta ravmagn ella vetni til framdrift nakað.

Í mun til galdandi løgtingslóg ber broytingin í stuttum í sær, at sonevndir luksusbilar frá 1. januar 2024 koma at rinda eitt virðisgjald á 45%, av tí partinum av CIF-virðinum, sum fer uppum kr. 200.000.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Føroya landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri landið orsakað av, at dýrir ravmags- og vetnisbilar koma at rinda eitt ávíst virðisgjald eitt ár fyrr enn eftir galdandi løgtingslóg.

Avgjaldið í 2024 verður tó bert lagt á tann partin av avgjaldsskylduga virðinum, sum er omanfyri kr. 200.000.

Akstovan hevur upp á fyrispurning upplýst í tíðarskeiðnum frá 2013 til 2023 vórðu í alt 1.334 ravmansbilar innfluttir. Allir ravmagnsbilar eru taldir við.

Um greinað verður upp á fakturavirði og tal av skrásetingum, sær úrslitið soleiðis út:

| | |
|---|---|
| 0-100.000 kr | 4 bilar |
| 100.000-150.000 kr | 28 bilar |
| 150.000-200.000 kr. | 172 bilar |
| 200.000-250.000 kr. | 331 bilar |
| 250.000-300.000 kr. | 266 bilar |
| 300.000-350.000 kr. | 230 bilar |
| 350.000-400.000 kr. | 143 bilar |
| 400.000-450.000 kr. | 56 bilar |
| 450.000-500.000 kr. | 23 bilar |
| + 500.000 | 81 bilar |
| Í alt | 1.334 bilar |

Verður hinvegin greinað upp á ár og tal av skrásetingum, sær úrslitið soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Ár 2013 | 3 bilar |
| Ár 2014 | 3 bilar |
| Ár 2015 | 3 bilar |
| Ár 2016 | 6 bilar |
| Ár 2017 | 15 bilar |
| Ár 2018 | 66 bilar |
| Ár 2019 | 77 bilar |
| Ár 2020 | 132 bilar |
| Ár 2021 | 295 bilar |
| Ár 2022 | 506 bilar |
| Ár 2023 fyri gott og væl eitt hálvt ár | 228 bilar |
| Í alt | 1.334 bilar |

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður umsitingarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum koma at verða avmarkaðar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið kemur helst at hava ávísar neiligar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Føroyar hava bundið seg til at fylgja Paris avtaluni um at minka útlátið av veðurlagsgassi. Við at stuðla einari grønari loyn til framdrátt av akførum minkar útlátið av $CO_2$.

Lógarupskotið hevur ikki ávirkan á henda stuðul, men lógaruppskotið málrættar lægra virðisgjaldið til fyrst og fremst bíligari ravmagns- og vetnisakførini.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atlikti at Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, sum bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og tað ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið er eitt avgjaldsuppskot, sum ber i sær, at virðisgjaldið hækkar stigvíst skjótari fyri dýraru ravmagns- og vetisakførini.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Við uppskotinum verður virðisgjaldið, sum stigvíst verður lagt á ravmagn- og vetnisakfør framskundað fyri dýraru akførini.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 4. september 2023

**Ruth Vang**
landsstýrismaður

/Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: